5 tær bestu

# TEIR BESTU GERA MUN Í AVGERANDI LØTUM



Fótbóltur | Eyðun Klakstein | eydun@sosialurin.fo

– Ein góður fótbóltsspælari er ein, sum er góður, tá tørvurin á hesum er størstur. Tað nyttar í mínari verð einki at brillera í einum dysti, sum tú vinnur 6-0, um tú vikuna aftaná er mest sum ósjónligur í einum 1-0 tapi, sigur Jákup Mørk, ítróttarskrivari á Sosialinum, sum her velir fimm teir bestu spælararnar í føroysku fótbóltskappingini

Jákup Mørk hevur skrivað um ítrótt á Sosialinum síðani 1999. Frá 1. januar í 2000 fekk hann ábyrgdina av ítróttarskrivingini, og síðani hevur hann skrivað hundraðtals greinar um fótbólt, hondbólt, flogbólt og allan annan ítrótt.

– Mær dámar sera væl at skriva um ítrótt, men tú skalt nokk vera mest sum sports-idiot fyri at tíma. Talan er um nógv úrtíðararbeiði, og ofta verða bæði kvøld og nætur tikin í nýtslu. Hinvegin, so plagi eg at siga, at hevði eg framvegis spælt fótbólt, so hevði eg kortini brúkt einar 20 tímar um vikuna upp á ítrótt, so hetta er upp á onkran máta ein annar háttur at vera aktivur, sigur Jákup Mørk.

Planet.fo hevur biðið Jákup Mørk velja fimm teir bestu fótbóltsspælarar í føroysku landskappingini, og hann gevur sítt boð her á síðuni.

## Skulu hava týdning fyri liðið

Jákup Mørk hevur valt teir bestu spælararnar út frá týdninginum, sum teir hava fyri síni lið – og ikki bara út frá tí, sum teir kunnu, tá ið tað gongur væl.

– Í mínum eygum er góður spælari ein, sum hevur stóran týdning fyri sítt lið. Sjálvandi hevur sjálvt bóltspælið sín stóra part at siga í hesum, men tað er ikki alt. Tað finnast jú nógvir fínar spælarar, sum allíkavæl ikki eru so berandi fyri liðið, sum teir kanska áttu at verið. Og so er ein góður spælari eisini ein, sum er góður, tá tørvurin á hesum er størstur.

– Tað nyttar í mínari verð einki at brillera í einum dysti, sum tú vinnur 6-0, um tú vikuna aftaná er mest sum ósjónligur í einum 1-0 tapi. Tað er jú í tøttu dystunum, at brúk er fyri spælarunum, sum kunnu gera munin, sigur Jákup Mørk.




### Jákup Mikkelsen, B36

Meira enn nakað, so er úrslitið hjá B36 higartil í ár eitt úrslit av framúrskarandi málmansspæli frá landsliðsmálverjanum. Ein klassamálverji er ein, sum bjargar javnleikinum, tá nógv stendur á, og sum við avrikum sínum er við til at fasthalda stigini í teimum heldur tepru sigrunum. Mált eftir hesum mátistokki, so hevur Jákup Mikkelsen longu nú verið góður fyri eini 8-10 stig hjá árstalsfelagnum.

### Súni Olsen, GÍ

Tað var ikki uttan orsøk, at Súni í fjør varð kosin ársins leikari. Í heimligu kappingini var hann framúr, men evni hansara komu ikki minst til sjóndar í landsdystunum. Har var Súni í fleiri førum einasti av føroysku spælarunum, sum støðugt royndi at spæla bóltin skilagott. Hóast mótstøðan ofta var øgilig, so læt hann seg sera sjáldan stressa til panikk-loysnir, og mest sum hvørja ferð var hann millum teir bestu føroysku spælarin. Í ár hevur hann – hóast GÍ hevur verið í stórum trupulleikum – aftur sýnt klassa, og í øllum førum mundi støðan hjá GÍ verið verri, enn hon er, var tað ikki fyri Súna.







### Pauli G. Hansen, Skála

Skal metast um, hvør spælari hevur størsta týdningin fyri lið sítt, so er Pauli G. Hansen avgjørt eitt av evnunum. Hóast tað ikki altíð sær út av so øgiliga nógvum hjá miðvallarmotorinum hjá Skála, so er hann drívmegin í stórum parti av framrættaða spælinum hjá liðnum. Hann er tann, sum stýrir pressspælinum hjá liðnum, hann vinnur hópin av bóltin við knallhørðum tacklingum. Hann er støðugt ein hóttan fyri mótstøðuliðið, og hann arbeiðir altíð við fullari kraft.

### Óli Johannesen, TB

Skal tosast um bestu heimligu spælararnar, so slepst neyvan undan at nevna landsliðsskiparan seinnu árini, Óla Johannesen. Hóast nógv gjøgnum tíðina hava funnist at tvørámanninum fyri at taka felagskensluna við Sevmýri fram um onnur og sterkari feløg, soleiðis at hann í fleiri umførum hevur spælt í aðru deild og á landsliðnum, so hava avrikini kortini altíð staðið mát. Ikki minst á landsliðnum, har bæði Henry, Duff og Ballack hava ásannað, at tú ikki bara uttan víðari rundar Óla Johannesen. Í ár hevur hann hartil sýnt eitt sjáldsama gott máltev, sum saman við annars solida spælinum hevur verið við til at lyfta TB á eina støðu, sum er munandi meira hugalig, enn hon so ofta hevur verið í bestu deildini.







### Hans Pauli Samuelsen, EB/Str

Tá talan nú skal verða um fimm spælarar, so er tað væl upp á sítt pláss, um onkur ungur og lovandi spælari eisini verður tikin fram. Her er valið fallið á Hans Paula Samuelsen, sum í kapping við fleiri aðrar er ein spælari, sum av álvara hevur markerað seg. Ikki bara í ár, men við avrikum, sum kanska hava svingað, men sum kortini við jøvnum millumbilum hava rakt absolutta toppin. Finturnar, sum hann kann diska upp við á einum góðum degi, eru ein sonn fragd fyri eygað. Bóltførleiki er framúr, og tað sama kann yvirblikkið verða til tíðir. Hartil er hann ein sannur fightari, sum altíð gevur seg 100%, og slíkir vilja altíð vera væl lýddir hjá viðhaldsfólkunum. Skal nakað minus setast, so er tað viðføddá sinnalagið, sum helst er størsta forðingin fyri, at Hans Pauli enn ikki av álvara er komin í landsliðshitan.